# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Guðrun Olsen listarkvinna:

## Framsýning á Galleri Working Art í Roskilde

TÍÐINDASKRIV

Frá 20. april til 10. maj 2006 hevur Guðrun Olsen framsýning á Galleri Working Art, Byvolden 10, Roskilde.

Fernisering verður leygardagin 22. april frá kl. 10-14, har øll eru vælkomin.

Guðrun hevur verið á skeiði hjá Lili Stampe Sørensen og verið næmingur hjá Tine Voldby Crumlin.

Sum útgangsstøði eru myndirnar hjá Guðruns í eins litum. Teir ymisku formarnir á myndunum hjá Guðrun tekur okkum við á eina spennandi dreymaverð við ymisikum motivum.

Opið er: hósd – fríggjadag frá kl. 13-17 og sunnudag frá kl. 10-14.

Guðrun Olsen er 35 ára gomul. Hon er fødd og uppvaksin í Klaksvík, dóttir Árna Olsen og Ruth Sørensen. Hon býr í Roskilde og hevur fingist nógv við at mála.



## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Marjun Wágsnes Niclasen** fer frá kapellinum á Suðuroyar sjúkrahúsi út í kirkjuna, í kvøld klokkan 18. Jarðarferðin verður fríggjadagin kl. 13 úr Tvøroyrar kirkju. Sungið verður úr Sálmabókini. Tey, ið vilja minnast Marjun, kunnu lata eina peningagávu til vælgerandi endamál; konta í Føroya Banka.

**Maria Petersen,** Fámjin, vanliga nevnd Mia, andaðist á Landssjúkrahúsinum mikukvøldið 19. apríl, 64 ára gomul. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

**Signhild Magnusen** úr Fámjin andaðist í Keypmannahavn 17. apríl, 78 ára gomul. Jarðarferðin verður leygardagin kl. 13.30 úr kirkjuni í Fámjin. Tey, ið vilja minnast Signhild, kunna lata eina peningagávu til kirkjuna í Fámjin, konta í peningastovnunum.

**Ala Monrad,** fødd Jensen úr Vági, andaðist páskadag á Bispebjerg Hospitali, 90 ár. Jarðarferðin verður mikudagin 26. apríl klokkan 10 frá Garnison kirkju.

## Petur Prent í Gallerí Tøting

TÍÐINDASKRIV

Frá 1. mai til 30. juni 2006 hevur Petur Prent framsýning við 34 oljumálningum og 8 vatnlitsmyndum í Gallerí Tøting í Syðrugøtu.

Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 10-17.30, og leygardag frá kl.10-14.



Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum at elskaða kona mín, mamma, vermamma og omma okkara

**Maria Petersen**
vanliga nevnd Mia
Fámjin

fór heim til Harran mikukvøldið 19. apríl.

*Familjunnar vegna*
**Arnfinn, Marianna, Ingmar, Benjamin og Rasmus**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum fyri sýnda samkenslu, tá okkara kæri sonur, beiggi, mammu- og pápabeiggi

**Jan í Eyðansstovu**
Sandavágur

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk til prestarnar Sverra Steinhólm og David Johannesen, fyri troystandi orð í kapellinum og kirkjuni.
Tøkk til kirkjutænarar, sangarar, berarar og gravara.
Øllum tykkum á Landssjúkrahúsinum og Pensionatinum, sum hjálptu Jan og tóku hond um, tá til trongdi.
Tykkum, sum hjálptu til við ervið, hjartans tøkk øll somul.
Takk fyri peningagávu til »Sinnisbata«.
Tøkk til tykkum, sum fylgdu Jan til seinasta hvíldarstaðið á fold.

*Fyri tey avvarðandi*
**Foreldur og systkin við familju**

Bjarni Åkesson Filholm, rithøvundur, Hjørring:

## Sóknast eftir tilfari um Norsku Løvu

Í sambandi við komandi bókina um skipið hjá Det dansk Ostindiske Kompagni "Norske Løve" sum sakk við Lambavík í 1707, søknast rithøvundurin Bjarni Åkesson Filholm eftir frásøgnum og evt. myndum frá fólki, ið hava kavað niður til skipið.

Um tað er onkur sum kann hjálpa til við t.d. at koma við eini frásøgn um kaving og leiting eftir Norsku Løvu og hevur myndir í hesum sambandi, er viðkomandi vælkomin at venda sær til: Bjarni Åkesson Filholm á mail-adressuni: filholmlange@has.dk



*Hesin ljósastakin frá Norsku Løvu stendur á Handels- Søfartsmuseet í Kronborg*
*Mynd: Kirsten Jappe*

### Dagurin í morgin

**21. apríl. Florentius.** Fleiri halgimenni eru við hesum navni. Hesin dagurin er ásettur til minnis um teir allar.

## Rósa Samuelsen tikið sæti á tingi



Rósa Samuelsen úr Sandavági hevur í dag tikið sæti á tingi.

Komandi dagarnar verður Rósa Samuelsen úr Sandavági tinglimur fyri Sambandsflokkin. Hon hevur tikið sæti á tingi fyri Marjus Dam, løgtingsmann, sum er í farloyvi.

Rósa Samuelsen hevur ikki havt sæti á tingi fyrr, men hon er virkin í kommunalpolitikki. Hon er borgarstjóri í Sandavágs kommunu og er harumframt forkvinna í Føroya Kommunufelag.